## Føðingar

2. august fingu Unn F. Gaardbo og Badara Diedhiov, Toftir, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

11. august fingu Poulina og Rógvi Magnusson, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4150 gr.

19. august fingu Barbara Poulsen og Hans Edvard Sigurðsson, Klaksvík eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4100 gr.

19. august fingu Agnes og Suni McIntosh, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3450 gr.

19. august fingu Laila og Bárður Kass Nielsen, Skála, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3500 gr.

20. august fingu Heidi Bjarkhamar og Davið Guðnason, Odense, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3760 gr.

20. august fingu Gunnvá Staksberg og Hans Egholm, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2570 gr.

20. august fingu Poula Ennigarð og Trøndur Lauritsen, Sørvágur, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3800 gr.

21. august fingu Tórhild og Símun Hannus Johannesen, Dalur, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3970 gr.

22. august fingu Annika Højsted og Petur Magnus Bjarnastein, Hoyvík, eia dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3050 gr.

22. august fingu Anna Gærdum og Palli á Lava Olsen, Skálavík, ein son. Hann var 59 cm langur og vigaði 4600 gr.

23. august fingu Anna Kristina N. Niclasen og Kristin Gærdbo, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3700 gr.

23. august fingu Ina og Petur Hammershaimb, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2900 gr.

24. august fingu Kristina N. Hansen og Jógvan Martin Hansen, Saltangará, ein son. Hann var 60 cm langur og vigaði 5300 gr. Hann eitur Eyðun.



*Báturin varð handaður hósdagin. Á myndini eru f.v. Ivan Olsen og sonurin, Karl Martin, saman við Hans J. Michelsen og Torkil Skála frá Kiwanis Tórshavn*

*Mynd Jens Kristian Vang*

# Ivan vann bátin

Hósdagin handaðu umboð fyri »Kiwanis Tórshavn« bátin, sum varð lutaður burtur á ólavsøku.

Hesaferð varð tað Ivan Olsen í Havn, sum vann bátin. Ivan er ættaður av Skála og siglir sum skipari við flakatrolaranum Sisimiut hjá Royal Greenland.

Ivan sigur, at hann í mong ár hevur ynskt sær ein slíkan bát, og í fleiri ár hevur hann keypt lutaseðslar frá Kiwanis á ólavsøku. Hesaferð keypti hann 10 lutaseðlar ólavsøkudag, og ein av hesum seðlum vann.

Talan er um eitt 5-mannafar, sum bátabyggjarin Terji Reinert Jakobsen í Kollafirði hevur bygt.

Báturin, sum hevur eitt søluvirði upp á umleið 50.000 krónur, er tann 14. sum Terji hevur bygt fyri Kiwanis Tórshavn.

Kiwanis er ein altjóða felagsskapur av sjálvbodnum, ið stuðlar teimum sum tørva hjálp - serliga børnum. Her hjá okkum hjálpir felagsskapurin børnum í føroyska samfelagnum. Peningurin verður savnaður inn á ymiskan hátt sum t.d. við at selja jólatrø, halda bingo ella við at selja lutaseðlar.

*mg*

## Prógv



23.juni 2009 fekk Jóhanna Akraberg Andreasen, Tórshavn, prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur við professionsbachelor frá Diakonissestiftelsens Sygeplejeskole á Frederiksberg.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálp, tá okkara høgt elskaða systir

**Daniella Toftum**
vanliga nevnd
Daniella í Kálhaganum

andaðist og var jarðað.
Takk til prest, kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Meinigheitshúsið.
Hjartans tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til á ymiskan hátt í sambandi við jarðarferð og ervi.

*Familjunnar vegna*
**Jóhan, Kristian og Celinda**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálp, tá okkara høgt elskaði bróður

**Jóhan Toftum**
vanliga nevndur
Jóhan í Kálhaganum

andaðist og varð jarðaður.
Takk til prest, kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Meinigheitshúsið.
Hjartans tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til á ymiskan hátt í sambandi við jarðarferð og ervi.
Og til tín Eyðun við familju, verður ynskt alt tað besta framyvir.

*Familjunnar vegna*
**Kristian og Celinda**

## Dagurin

28. august. Augustinus, deyður ár 430. Føddur í Tagaste í Norðurafrika. Eftir mongum ymiskum vegum gjørdist hann kristin og endaði biskupur í Hippo í Norðurafriku. Hann doyði tá ið vandalakongurin Geiserik kringsetti staðin. Augustin var mætasti kiskjulærarin í fornkirkjuni og hevði tær komandi øldirnar mikla ávirkan á kristna heimspeki og guðfrøði. Navnið Augustus er latínskt og merkir hin hátt upphevjaði.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. brøytta útgáva 2008)*